menniskjum, so sum ást, girnd, kunnleiki, átrúnaður og list.

Triði parturin er tann løgnasti, men samstundis tann mest áhugverdi og avbjóðandi, tí hesar yrkingarnar eru meira eksperimentellar, og har finnur tú eisini tveir stuttar prosatekstir, sum eru nakrir teir mest bisaru, sum eg havi lisið á føroyskum. Hugsi mær henda part sum tann táttin í lívinum, tá ið ein sum høvundur er opin fyri at royna alt í leitinini eftir tí sonevnda sublima, og tá kann tað, sum spyrst burturúr, blíva rættiliga margháttligt.

Í fjórða parti hevur skaldið so at siga runnið hornini av sær, spurningarnir snúgva seg nú meira um tilveruna og órannsakandi vegir hennara. Her finna vit yrkingar um syrgiligar hendingar, sum høvundurin hevur verið sjónliga ávirkaður av, stórar vanlukkur, sum fær ein til at ivast í, um nøkur meining er við nøkrum sum helst.

Tíbetur gevur hetta fyrsta yrkingasavnið hjá Hanusi Kamban sjálvt svarið, og kann tað stutt takast samanum við síðsta ørindinum í yrkingini við tittulheitinum "Café Europa" (bls. 59):

*henda mjørkamorgun / í Havn millum bløðandi / fuchsiur og ryskir við krúllum av / trølsliga glinsandi / filigrann-døgg*

Hvat meir kunnu vit forlanga?

Sum lesarin vónandi hevur skilt, er undirritaði rættiliga hugtikin av hesum savni. Perma og uppseting eru í allar mátar eins leskilig og Toscasnitturnar á Kondittarínum, ið eisini prýða permuna. Málsliga og innihaldsliga er savnið merkt av óvanliga mongum nøvnum, orðum og tilsipingum. Hetta er sera avbjóðandi og uppríkandi fyri tann forvitna, sum vil brúka sína tíð til at arbeiða við tilfarinum, men eg hugsi, at tað man vera troyttandi og onkisigandi fyri hini.

Eitt sum eyðkennir skriving Hanusar sum heild, er hansara nærlagni og ovurhugi at greiða gjølla frá øllum, sum hann vil siga við tí, sum hann skrivar. Royndum lesarum dámar hetta vanliga ikki so væl, tí sum oftast missir teksturin (og harvið eisini lesingin) við hesum meira enn hann fær, tí trongdin til "information overload" avmarkaðar møguleikarnar fyri, hvussu lesarin kann skilja tekstin. Fyri minni royndar lesarar kenst tað sjálvandi tryggari, at høvundurin heldur í hondina á einum og leiðir ein gjøgnum tekstin.

Nýggja yrkingasavnið hevur onga leiðbeining um, hvussu yrkingarnar skulu lesast, men heldur eru yrkingarnar í sjálvum sær stuttar ritgerðir um yrkingalistina, bæði í formi og innihaldi. Líkt er til, at Hanus vil yrkja víðari aftir teirri leið, sum ein av stóru fyrimyndum hansara, Janus Djurhuus, troddi. Hanus orðar tað sjálvur soleiðis í fyrilestrinum "Ramman ella myndin", sum stendur prentaður í greinasavninum *Hin bráðvakra hugsjónin,* sum kom út í 2000:

*"Janus gjørdi tíðliga av at tæna málinum í rúmligari merking. Málið var ein høll, har bæði formur og miðil sótu til háborðs. ... Umframt at eiga ein form, sum skuldi røkjast, var málið fyri honum ein samskiftismiðil, eitt spegl, sum bar Norðurlond inn í brúkarans huga, sum spegladi Europa, sum varpaði inn í nútíðina tankar og fyrimyndir úr Hellas. Meira enn tað, formur og miðil ríkaðu hvønn annan, úr dialektikkinum teirra millum gróði mýking og viðkan, fremmandar spegilsmyndir lyftu formin upp og edlaðu hann. At gera sítt til at fullføra hesa edlan, tað var lívsverkið, Janus setti sær fyri at fremja."*

Mær tykir, at Hanus Kamban við hesum savni hevur megnað at fáa fram fremmandar spegilsmyndir, í dialektikkinum millum mál og form.

Vælvalda heitið *Café Europa* er sum savningarhugtak rámandi, tí yrkingasavnið er eitt slag av ferð gjøgnum europeiska mentanarsøgu. Tittulin er sjálvsagt eisini ein viðmerking til føroyska stavseting og nýtslu av fremmandaorðum: "c" er ikki sloppin við í føroyska stavraðið, og sambært móðurmálsorðabókini stavast heitið á tí heimspartinum, sum vit búgva í, Evropa, ikki Europa.

Samanumtikið er *Café Europa* eitt satt fýrverk av poetiskum formum og motivum úr europeiskari og føroyskari bókmentasøgu. Hevur tú sum lesari tíð og dirvi til at fara undir tað, lønar tað seg aftur í síðsta enda.

